**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 4. mars 2025
J. nr.: 25/05025-2

**Svar uppá fyrispurning nr. 52-084/2024 frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um keyp og gjøgnumskygni hjá stjórnarráðum og stovnum landsins.**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvar krónur hava stjórnarráðini og stovnar landsins árliga keypt fyri í vørum og tænastum seinastu 3 árini?
2. Hvussu stórur prosentvísur partur av keypunum hesi árini hevur verið í útboði; og kundi tað verið ein størri partur, sum varð boðin út?
3. Hvat vísa hagtølini hvat viðvíkur, hvussu væl tað loysir seg peningaliga at bjóða út?
4. Eru ætlanir um at gera keyp landsins meiri gjøgnumskygd – eisini smærru upphæddirnar?
5. Um ja, hvussu langt er man komin við hesum?

**Svar til spurning 1:**

| **(í mió. kr.)** | **Roknskapur 2022** | **Roknskapur 2023** | **Roknskapur 2024 (ikki endaligur)** |
|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 1.675 | 1.780 | 1.766 |
| Keyp av útbúnaði | 133 | 153 | 143 |
| **Tilsamans** | **1.808** | **1.933** | **1.909** |

**Svar til spurning 2:**
Tað er ikki skrásetingargrundarlag til at svara spurninginum. Bert útboð, sum eru løgd á Keypsportalin, og umbiðin undantøk, er yvirlit yvir og tá ikki altíð í mun sáttmálaupphædd. Nevnast kann, at í 2022 vóru 48 útboð á Keypsportalinum, í 2023 var talið 41, og í 2024 vóru aftur 48 útboð. Smærri keyp í hópatali verða avgreidd sum tilboðsfyrispurningar, og teir eru ikki skrásettir hjá Keypsportalinum.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan hava tó eina greiða fatan av, at tað kundi verið meira, sum varð bjóðað út, gjøgnum útboð, tilboðsfyrispurningar ella fevnt av rammusáttmálum.

**Svar til spurning 3:**
Sum greitt frá omanfyri finnast ikki nøktandi hagtøl um heildina. Men tað er greitt, at tá ið stovnar landsins bjóða vørur út í kapping, gjøgnum útboð ella tilboðsfyrispurning, so eru royndirnar aloftast sera góðar. Tað eru nógv dømi um stovnar, sum hava fingið vørur og tænastur munandi bíligari. Tað kann eisini verða lagt afturat, at tað at kappingarútseta almenn keyp, styrkir kappingina í landinum og loyvir nýggjum veitarum framat.

**Svar til spurning 4:**
Fíggjarmálaráðið hevur til áður settan fyrispurning, fyri beint yvir trimum mánaðum síðani svarað, at arbeitt verður við at dagføra rundskrivið og at gera fleiri átøk fyri at kappingarútseta almenna keypið av vørum og tænastum.

Málið er tað sama, sum tað altíð hevur verið og tað er, at fleiri keyp skulu verða bjóðað út, gjøgnum útboð, tilboðsfyrispurningar ella fevnt av rammusáttmálum, soleiðis at meira fæst fyri skattgjaldarans pening.

Ætlaði átøk:

- Arbeitt verður við at dagføra rundskrivið, herundir lækka upphæddina fyri nær bjóðast skal út, og verður hetta arbeiðið eftir ætlan skjótt liðugt. Ætlanin er eisini at dagføra sjálvan keypsportalin tøkniliga.
- Gjaldstovan skal eisini frameftir hava eitt vakið eygað við, at landsins stovnar útseta síni keyp fyri kapping. Hetta verður fyrst og fremst gjørt við at styrkja keypsfunktiónina. Hetta kann verða fíggjað við einum parti av teimum sparingum, sum verða skaptar.
- Eftirlitið við rundskrivinum kann eisini betrast við, at stovnar skulu vátta um keyp eru kappingarútsett, við tøknligari loysn, sum Gjaldstovan fer at menna.
- Royndirnar hjá Gjaldstovuni við rammusáttmálum hava víst, at tað er munandi upphæddir at spara. Gjaldstovan skal tíðskil skipa fleiri útboð av rammusáttmálum.
- Fíggjarmálaráðið skal tryggja, at tað kann fáa játtanarligar fylgjur, um tað verður staðfest, at stovnar ikki halda seg til rundskrivið.

**Svar til spurning 5:**
Víst verður til svarið til spurning 4.

Tinganes, 4. mars 2025

**Ruth Vang**
*Landsstýriskvinna í fíggjarmálum*